# Javnaðarflokkurin helt vælferðarlyftini

## Avrikini hava aldri verið størri - vit hildu tað vit lovaðu, og væl tað!

*Pensjonistar hægri raðfesting enn nakrantíð*

- Við Samhaldsfasta er pensjónin til stakan hækkað 25.500 kr. um árið frá 2004 til 2008
- Til pensjonistahjún er pensjónin hækkað 47.800 kr um árið frá 2004 til 2008
- 151 nýggj eldrabúpláss eru komin aftrat í hesum valskeiðnum
- 220 starvsfólk komin aftrat í eldrarøktina og játtanin er hækkað 90 mió kr.
- 161 starvsfólk eru haraftrat komin til aðra umsorgan á heilsu- og almannaøkinum
- Lægstu fyritíðarpensjonistar hækking við 1.280 kr./mán. í 2008 og 2.662 kr./mán. í 2009
- Mótrokning hjá fyri tíðarpensjonistum av aðrari inntøku lækkað úr 60 til 30%

*Sjúkrahúsverk í menning*

- Nýggj sjúkrahúslóg við sjúklingaráð og heilsutilbúgving sett í verk
- Diabetes-ambulatorium á øllum 3 sjúkrahúsum
- Verklagslóg uppá 105 mió til nútímansgerð av Landssjúkrahúsinum
- Læknatænastan økt á 5 serlæknaøkjum
- Ílegugransking og Ílegusavnið skipað við 3,5 mió
- Nútíðargerð av røntgen- og laboratoriuskipan á sjúkrahúsunum fyri 26 mió.kr.

*Stór framgongd á psykiatriska økinum*

- Sosialpsykiatri við bústaðar og virknistilboðum sett í verk
- Økispsykiatri og barna- og ungdómspsykiatri sett í verk
- Játtan til sosial-, økis- og barna- og ungdómspsykiatri økt við 15 mió
- 3 nýggj sambýli til sinnisveik sett á stovn
- Byrjan gjørd til Økisdepil fyri sinnisveik í Vági og nýtt sambýli í Havn

*Fólkaheilsa sett á dagsskrá*

- Fólkaheilsuætlan føroyinga: fyribyrgjandi heilsukanningar, átøk fyri rørslu, sunnum kosti, móti royking og rúsevnismisnýtslu
- Fólkaheilsurenning og heilsuátøk við vatnkølara og frukt til skúlabørn
- SSP-samtarv fyri at fyribyrgja misnýtslu og harðskapi millum børn og ung
- Nýggj tubbakslóg fyri at víðka um roykfría umhvørvi

*Betri kor fyri tey minni mentu*

- Nýggj landsfevnandi barnaverndarskipan á hægri fakligum støði
- Persónligan stuðul til førleikatarnað eisini eftir pensjónsaldur
- Nýggir stovnar og tilboð til autistar og til fjølbrekað børn
- Stuðul til nýggjan ALV-verkstað fyri fólk við skerdum førleika
- Stuðul til endurbúgving og vard størv hækkað 100% upp í 30 mió.kr.
- Stuðul til familjur við brekaðum børnum hækkað 50% upp í 24 mió.kr.
- Heimleys hava fingið lógarfestan stuðul til umsorgan og býli